# BESTUR



## 23 kr/kg

Fiskiskapurin hjá Brestir hevur yvirhøvur verið góð. Men slagið hevur verið skiftandi. Í fjør fingu teir soleiðis rættiliga nógvan upsa, men í ár hava vit næstan ongan upsa fingið.

Hinvegin royna teir mest eftir kongafiski og svartkalva, og hevur prísurin verið á eini góðari leið.

- Jú, prísurin fyri svartkalvan hevur verið rættiliga góður í summar. Vit hava havt ein miðalprís uppá 23 krónur fyri kilo, meðan hann í fjør lá um 18 krónur.

- Og kongafiskurin hevur í ár ligið um 9 krónur. Í mun til í fjør, hevur tað heldur ikki verið so galið, tí tá lá hann um 7-8 krónur.

**RIGGA TIL**

*Mikudagin í farnu viku lógu teir umborð á Bresti við bryggju í Sørvági og riggaðu til nýggjan túr í føroyskum farvatni. - Hetta er eitt gott skip, sigur skiparin, Thorman Niclasen úr Bø*

*Mynd: Jens Kristian Vang*